# NSÍ móti Vali

Sum føroyameistarar verða tað í ár NSÍ-spælararnir, sum skulu dystast um sonevndar Atlantic Cup-steypið. Tann dysturin verður spældur leygardagin, og er tað Valur, sum tá er mótstøðuliðið. Dysturin verður í Íslandi, og eftir at hava spælt í Gundadali í gjár, fer NSÍ nú til Íslands, har dysturin móti Vali verður spældur.

# Nummar 194

Altjóða fótbóltssambandið, FIFA, kunngjørdi fyrr í vikuni nýggjan heimsstyrkislista. Føroyska landsliðið er dottið eitt pláss aftur á listanum síðan seinastu dagføring, og liggur nú nummar 194 av teimum 202 londunum. Føroyar hava einki stig vunnið sær síðan seinastu dagføring. Møguleiki var at vinna okkum stig í vinardystinum móti Íslandi í mars, men hann tapti føroyska liðið 0-3. Flestu londini í niðara endanum av styrkislistanum vinna sær stig í vinardystum, og Føroyar fær henda møguleikan í juni, tá ið Estland kemur á vitjan í Føroyum. Topp 3 á styrkislistanum er óbroyttur. Her er Argentina á fremsta plássi frammanfyri Brasil og Italia. Svøríki liggur nummar 24, Noregi sum nummar 28, og Danmark heldur fast við 33. plássið.

B36-NSÍ 1-1 (1-1):

# Meistararnir bardu seg til eina stigið

**B36 og NSÍ møttust í framskundaðari uppgerð í Formula-deildini í gjárkvøldið. Eftir ein javnan fyrra hálvleik var B36 greitt omaná í seinna hálvleiki, og runavíkingar kunnu vera best nøgdir við eina stigið**



*Eftir steðgin sat B36 á tí mesta, men tað eydnaðist kortini NSÍ at stríða seg til annað stigið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA um dystin

**B36-NSÍ 1-1 (1-1)**
**1-0:** Klæmint Matras(br.), 3.
**1-1:** Jónhard Fredriksberg, 9.
**B36:** Meinhardt Joensen – Magnus Olsen, Dmitrij Jankovic, Herbert í Lon Jacobsen, Alex José dos Santos – Róaldur Jacobsen, Klæmint Matras, Oddmar Færø (Tamas Nagy, 65.), Hanus Thorleifsson, Karoly Potemkin, Bergur Midjord
**Gult kort:** Klæmint Matras, Herbert í Lon Jacobsen
**NSÍ:** Tórður Thomsen – Aco Pandurovid, Óli Hansen, Johan T. Davidsen (Pól Jóhannus Justinussen, 8.), Nenad Stankovic, Bogi Løkin, Milan Pejcic (Sjúrður Jacobsen, 80.) – Jónhard Fredriksberg, Øssur Dalbúð (Dejan Stankovic, 63.), Hjalgrím Elttør
**Gult kort:** Óli Hansen, Einar Hansen

**FORMULADEILDIN**
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Bæði B36 og NSÍ hava undan hesum kappingarárinum mist týðandi leikarar, men feløgini verða tó altíð knýtt at oddanum. Tí var stórur spenningur í luftini, tá ið liðini bæði møttust í Gundadali í gjárkvøldið. NSÍ hevur nakað at prógvað eftir eina trilvandi kappingarbyrjan, meðan unga og spildurnýggja B36-liðið skuldi byggja víðari uppá góðu byrjanina.

### Snarlig byrjan

Dysturin fekk eina óvanliga snarliga byrjan. Bergur Midjord hjá B36 varð spældur leysur í brotsteiginum, og varð feldur av Tórði Thomsen í NSÍ-málinum. Eiler Rasmussen ivaðist ikki, og longu í 2. minutti mátti hann peika á brotssparksblettin. Hetta brotsspark setti Klæmint Matras í netið, og við 1-0-leiðslu longu eftir fyrsta álop hevði B36 fingið best hugsandi byrjanina.

So við og við stríddi NSÍ seg inn aftur í dystin, og í 10. minutti fingu teir útjavnandi málið. Jónhard Frederiksberg fekk eina góða sending, og púra einsamallur móti málmanninum lyfti hann bóltin hegnisliga upp um Meinhard Joensen í B36-málinum.

### Funnu seg sjálvar

Eftir snarligu byrjanina var heldur turrisligt við málmøguleikum, og í heila tikið var tað ikki serliga áhugavert at síggja. Liðini stríddust um bóltin á miðjum vølli, og hetta lat ikki upp fyri nógvum møguleikum. Nakrir einstakir vóru tó síggja, og beint fyri hálvleik manglaði lítið í, til at Jónhard Frederiksberg skjeyt sítt næsta mál. Liðini komu ikki tættari málinum, og í tráð við dystargongdina fóru liðini til hálvleiks við støðuni 1-1.

### B36 við yvirlutan

NSÍ viknaði nógv í seinna hálvleiki, og høvdu teir sera trupult við at finna hvønn annan. Alt og nógvar skeivar spælingar vóru at síggja, og hetta gav B36 møguleikan at seta seg við róðrið. Bergur Midjord var nær við at leggja B36 á odda fimm minuttir inn í seinna hálvleik, men skallarin hjá honum streyk beint framvið málinum. NSÍ stríddist væl, men spælið var lítið samanhangandi í báðum endum.

Um miðjan seinna hálvleik var tætt við at 17 ára gamli Róaldur Jacobsen legði heimaliðið á odda, men henda málroyndin streyk somuleiðis framvið málinum. B36 hevði yvirvág í spælinum, men hevði trupult við at fáa bóltin í málið. Karoly Potemkin átti eitt korter fyri leiklok ein risa stóran málmøguleika, men harða skotið varð meistarliga bjargað av Tórði Thomsen í NSÍ-málinum.

NSÍ átti onkran smávegis málmøguleika, men als ikki so nógvar, sum væntast kann av einum so sterkum liðið. Tá ið teir komu so langt vóru teir heldur ikki neyvir frammanfyri málinum.

Karoly Potemkin fekk í yvirtíðini ein gyltan møguleika at tryggja B36 øll trý stigini, tá ið hann slapp einsamallur móti NSÍ-málinum. Enn einaferð var Tórður Thomsen á rætta staðnum, og fekk kveistrað seinasta málmøguleikanum burtur. Dysturin við tveimum fullkomiliga ólíkum hálvleikum endaði 1-1, og harvið hava tvey av spáddu oddaliðunum longu nú mist fyrstu stigini. Javnleikurin ber í sær, at bæði B36 og NSÍ hava fýra stig fyri tveir dystir.

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 5 | 1 | 4 | 4 |
| 2 NSÍ | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 3 HB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 8 | 1 | 7 | 3 |
| 4 EB/S | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 0 | 4 | 3 |
| 5 Víkingur | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 6 B71 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 7 B68 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 8 KÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 4 | -4 | 0 |
| 9 ÍF | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 4 | -4 | 0 |
| 10 Skála | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 1 | 8 | -7 | 0 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 7 | 0 | 7 | 3 |
| 2 07 Vestur | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 3 |
| 3 TB | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 4 VB/S | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 5 HB | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 Víkingur | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 NSÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 0 |
| 8 B68 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 9 KÍ | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 2 | 6 | -4 | 0 |
| 10 EB/S | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 0 | 7 | -7 | 0 |

## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 11.04 | Víkingur-ÍF | Lars Muller |
| 13.04 | EB/S-B68 | Jens P. Brattalíð |
| 13.04 | HB-B71 | Rúni Gaardbo |
| 13.04 | Skála-KÍ | |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 12.04 | NSÍ-HB | Rói Jacobsen |
| 12.04 | 07 Vestur-AB | Georg Rasmussen |
| 12.04 | Víkingur-B68 | Høgni Hansen |
| 12.04 | VB/S-KÍ | Petur Reinert |
| 13.04 | TB-EB/S | Páll Augustinussen |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 13.04 | KÍ-AB | Alex Troleis |
| 13.04 | B36-Víkingur | Kristian M. Mouritsen |
| 13.04 | VB/S-Skála | Páll Augustinussen |